# Kristoffur Joensen farin um sýnuna



Týsdagin 27. februar andaðist Kristoffur Svabo Joensen, 84 ára gamal. Fór til gravar úr Argja kirkju leygardagin 3. mars.

Kristoffur var sørvingur, føddur 21. juli 1922. Var úr barnaflokkinum hjá Nesakristinu og Jóhan hjá Lonajógvani, ættaður úr Miðvági - úti í Lið í Sørvági, tað var stutt at siga eitt vanligt fiskaraheim. 7 vóru tey í systkinaflokkinum.

Blaðungur fór Kristoffur til skips, onkran feskfiskatúrin var hann í Skotlandi undir krígnum. Sigldi við „Royndini", sum Sørvingar áttu. Var í Grønlandi við „Kúrbergi" við Johan í Hoyvík, við snøri. Fór á skúla og tók prógv sum setuskipari. Um tað mundið komu tey saman, Gugga og Kristoffur, giftust og fingu sonin Paula, búðu tá hjá verforeldrunum. Bygdu á Argjum í 1952. Trý eru børnini hjá Guggu og Kristoffuri: Pauli, Kjartan og Malla. Gugga doyði í 1993.

Kristoffur førdi snurruváðsbátin „Akranes", og royndu teir í Norðsjónum. Louis, Poul Arne og Kristoffur, brøðurnir og aðrir sørvingar áttu „Akranes", keyptur til Føroya í 1946, og teir høvdu hann í 5 ár og væl gekst; men so flytur Ísland fiskimarkið út, tað var stóri smeiturin fyri snurruváðsbátarnar.

Nógv kenna Kristoffur, frá árunum hann var fiskari - teim árum hann var arbeiðsformaður á Bacalao og síðani sum leiðari á pakkhúsdeildini hjá Strandfaraskipum Landsins.

Krisoffur verður nevndarlimur í Havnar Arbeiðsmannafelag í 1976, samstundis skrivari. Í hesum tíðandi álitisstarvi sat hann, til hann leggur frá sær fyri aldur í 1993.

Kann verða nevnt, at Kristoffur eisini nam prentsmiðjuyrkið, stutt skifti var hann á prentsmiðjuni hjá Arnold Øster, har var bróðurin Poul Arne frammanundan!

Kristoffur hevði sítt støðufesti í Javnaðarflokkinum, m.a. sum stillari og valevni.

Jarðarbrúk hevði Kristoffur mest sum ítriv, og mundi tað eisini vera frá tíðini sum hjálparmaður hjá verpápanum Dánjal Petur Dam (Pobbin). Hann var røktingarmaður á sýslumansjørðini eitt langt lív.

Mangan hoyrdu vit treystu rødd Kistoffurs, tá "teir fýra" sungu í missiónshúsum og aðrastaðni.

Við jarðaferðina í Argja Kirkju leygardagin 3. mars sang Sverri Mortensen, sum var ein av "teimum fýra" sangin teir ofta sungu "Kom lyt til et råd fra din moder, min søn"

Nú foldarlívið er endað, eiga vit ljósu minnini eftir vinmannin Kristoffur Svabo Joensen.

**jl**

## *Kom lyt til et råd fra din moder*

1. *Kom lyt til et råd fra din moder min søn,*
   *kom bøj dine knæ før du går,*
   *:/: jeg ved du skal ud, men kan hænde det er*
   *den sidste formaning du får :/:.*

2. *Vel kunde jeg gi' dig på rejsen, min søn,*
   *en gave af sølv eller guld*
   *:/: men tag denne bibel, hvert eneste blad*
   *af herlige skatte er fuldt :/:.*

3. *Den var for mig selv en oprejsning, min søn,*
   *da ud ifra hjemmet jeg drog,*
   *:/: jeg elsker den så, men jeg gi'r den til dig,*
   *den velsignede herlige bog :/:.*

4. *Se ind i mit gulblege ansigt, min søn,*
   *det visnet og falmet jo er,*
   *:/: et skjønnere ansigt du vistnok får set,*
   *men ingen, som har dig så kær :/:.*

5. *Snart vokser der mos på min gravhøj, min søn,*
   *den arm som dig ledte er stiv,*
   *:/: men husk, at din moders formaning og bøn,*
   *skal leve om moder er død :/:.*

**(MH)**



*»Teir fýra« syngja, f.v.: Enok Dam, Sverri Mortensen, Kristoffur Joensen og Thomas Thomassen*

*Mynd: Trúboðin*



*Her syngja Kristoffur Joensen, Sverri Mortensen, og Enok Dam undir minningarhaldi teirra sjó-lætnu á Sjómansheiminum í Havn 1. november 2005. Hátíðarhaldið var í sambandi við, at 60 ár vóru liðin síðan seinni heimsbardagi endaði í 1945. Teir tríggir: Kristoffur, Sverri og Enok sigldu allir undir krígnum, og Sverri misti pápan á sjónum undir krígnum við »Nýggjaberg«*

*Mynd: Óli Jacobsen*

## Andlát og jarðarferðir

**Sofus Richard Klakkstein úr Innistovu í Klaksvík** andaðist sunnudagin 4. mars á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 49 ára gamal.

**Sigrid Eysturdal, Klaksvík**, andaðist í heiminum mánadagin 5. mars, 93 ára gomul. Farið verður úr kapellinum mikudagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin klokkan 13.30.

**Lisa Nattestad, fødd Rasmussen úr Miðvági**, andaðist á Landssjúkrahúsinum 4. mars 88 ára gomul.




